## Súni um lestrarstarvið

Eg arbeiddi ikki nakað serligt í lestrartíðini. Eg arbeiddi tá eg var heima í feriunum. Tá arbeiddi eg t.d. á skrivstovuni hjá Nyki á Toftum, og koyrdi eg trailara og lastbil. Í sjálvari lestrartíðini setti eg fult fokus á sjálvan lesturin.



## Bilurin hjá Súna: Audi A6

# Lívið hjá Súna er eitt roknistykki upp á 4 x 11

**11 er tað afturvendandi talið hjá Súna Scwartz Jacobsen, sum 1. februar 2006 tók tað stóra stigið úr einum grannskoðarafelag, sum hann átti stóran part í, og yvir í stjórasessin í Føroya Banka**



## Samrøða



**Heri Simonsen**
blaðmaður
heris@sosialurin.fo

Lívið hjá Súna Schwartz kann býtast upp í 4 tíðarskeið, sum øll eru uppá 11 ár. Súni er føddur 24. oktober í 1963, í Klaksvík. Tey fyrstu 11 árini búði hann í Klaksvík. Mamma Súna; Noomi er ættað úr Klaksvík. Í 1974 byrjaði pápi Súna; Schwartz, sum er ættaður úr Norðragøtu uppá at framleiða vindeygu og hurðar úr plasti og aluminium í virkinum Alu-Plast í Norðragøtu. Tá flutti familjan yvir um fjørð. Tíðarskeiðið 1974-1985 búði Súni so í Norðragøtu. Súni er yngstur av trimum brøðrum. Hinir báðir eru Richard og Amaliel. Lestrarárini 1985-1996 búði Súni í Danmark. Og hesi síðstu 11 árini hevur Súni búð í Føroyum, síðstu 9 árini á Argjum. Meðan grannalondini hava síni "Seven-Eleven", hevur Súni sítt egna "Four-Eleven"

### Las ikki nógv sum barn

Barnaárini, og tey fyrstu ungdómsárini legði Súni ikki nógv í at lesa. Fakta er, at hann skulkaði longu tann fyrsta skúladagin. Tað námsfrøðiliga lá ikki so frammaliga í huganum hjá lærarunum afturi í 1970. Súni bleiv, sum so mangur annar næmingur, ið var lámur, tvungin at skriva við høgru hond. Tað var lærarapolitikkur meginpartin av 20. øld. "Men so dugi eg líka væl at skriva við báðum hondum, og so kann ein skifta ímillum, og ikki fáa gøð!" sigur Súni við einum skeivum smíli. Bøkurnar blivu ikki nógv gloppaðar hesi árini. Hvørki í barnaskúlanum í Klaksvík, ella við Gøtugjógv. Og ikki var Súni tann, sum hevði gjørt mest við tað, tá hann tók realprógv í Fuglafjarða Skúla, í 1980. Súni tók sær eitt arbeiðsár eftir realskúlaárini í Fuglafirði. Tá hendi nakað, sum fekk lesi- og lestrarhugin hjá Súna í eina jaliga og fasta legu.

### HF var byrjanin

Hetta árið var Súni m.a. til skips við Sjúrði Tollakssyni, og arbeiddi hann eisini á Alu-Plast hjá pápanum. Í tíðarskeiðum koyrdi hann eisini gravkúgv og lastbil. "Súni hevur bensin í blóðinum" plagdi Heri Thomsen í Gøtu at siga um Súna tá. Vakri Audi6 bilurin í túninum mótsigur ikki orðunum hjá Hera Thomsen. Frá barna- og ungdómsárunum hevur Súni havt ein góðan vin,

sosialurin